Sosialurin





*Soleiðis skjýtur arkitekturin, J. P. Gregoriussen upp at Bládýpið verður bygt saman við Føroya Listasavni*

# Bládýpið verandi á Listas

**Listaverkið Bládýpið verður verandi á Listasavninum, staðfestir formaðurin í stýrinum fyri Listasavnið. Sostatt tekur stýrið ikki undir við almennu útsøgnunum hjá savnsleiðaranum, Helga Fossadal, í spurninginum um, hvussu málið um Bládýpið best kann loysast**

MENTAN
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

- Stýrið fyri Listasavnið hevur ongar ætlanir at flyta listaverkið Bládypið hjá Tróndi Patursson út á kaiuna, staðfestir stýrisformaðurin Martin Næs.

Sostatt tekur stýrið ikki undir við leiðaranum á Listasavninum, Helga Fossadal, sum nú fleiri ferðir hevur boðað frá, at hann vil hava Bládýpið flutt av økinum hjá Listasavninum og yvir á Farstøðina, har hann heldur hana hóska betri millum hinar bingjurnar.

## Loysn í samráð við listamannin

Hóast stýrið enn arbeiðir við málinum, liggur eitt tó púra greitt longu nú.

- Tað er ikki uppá tal at flyta Bládýpið út á farstøðina. Vit kenna treytirnar hjá Tróndi Patursson fyri at lata savninum verkið sum gávu, og hesum arbeiða vit út frá, sigur stýrisformaðurin Martin Næs, sum fer at kalla stýrið fyri Listasavnið á fund um málið í næstum.

Treytirnar hjá Tróndi Patursson eru millum annað, at Bládýpið á onkran hátt verður bygt saman við Listasavninum. Hesi loysnini vildi leiðarin á Listasavninum tó ikki vita av, tá listamaðurin legði hana fram í 2008, og í Sosialinum herfyri staðfesti hann enn einaferð, at:

- Vit hava ongar ætlanir um at gera pláss fyri verkinum inni á Listasavninum ella á annan hátt knýta »Bláðdýpið« til listasavnið, segði Helgi Fossadal

Hesi orðini mugu eftir øllum at døma standa fyri hansara egnu rokning, tí sambært stýrisformanninum ætlar stýrið at listaverkið skal verða partur av savninum.

- Eg eri vísur í, at vit finna eina loysn, sum miðar eftir at knýta Bládýpið at Listasavninum, sigur Martin Næs, sum annars ikki vil gera viðmerkingar til útsøgnirnar hjá Helga Fossadal.

Martin Næs vísir á, at talan er um eina heilt serliga gávu til eitt savn. Hann leggur afturat, at í flestu førum vera gávur latnar einum savni treytaleyst, men verða tær latnar við treytum, má støða takast til hetta, og tá fyrst og fremst í samráð við gevaran, har tað ber til.

Sjálvur sigur Tróndur Patursson at hann setti treytir við gávuna, tí hann var bangin fyri, at leiðarin annars fór at gera sum honum lysti við Bládýpið og tí Listasavnið ikki altíð hevur hildið seg til reglurnar hjá ICOM, Altjóða Stovninum fyri listasøvn.

## Fossadal ímóti stýrum

Hetta er sostatt aðru ferð savnsleiðarin, Helgi Fossadal, gongur beint móti ynskinum hjá einum stýri fyri Listasavnið í málinum um, hvat skal henda við Bládýpinum.

Heldur ikki í 2008 vildi Helgi Fossadal vita av uppskotinum hjá Tróndi Patursson um, hvussu Bládýpið kundi knýtast at Listasavninum, hóast táverandi stýrið tók ímóti gávuni og fegið vildi arbeiða víðari við uppskotinum.

Hetta staðfesti táverandi stýrisformaðurin, Jógvan Páll Lassen í Sosialinum 15. januar, har hann millum annað segði:

- Stýrið fyri Listasavnið varð samt um at taka ímóti verkinum sum gávu, og sambært einum skrivi skuldi Listasavnið taka sær væl av verkinum framyvir.

Skrivið, sum Sosialurin eisini hevur fingið innlit í, er eitt uppskot til eina loysn, sum er undirskrivað av listamanninum Tróndi Patursson og stjóranum í Norðurlandahúsinum, Niels Halm.

Norðurlandahúsið var